

*Jytte Joensen hevur høvuðsleiklutin sum Edit Piaf. Hon hevur eisini týtt tekstirnar*

*Myndir: Martin Sirkovsky*







# Sang, kjaft og erotikk

**- um tað snýst leikverkið, Piaf, sum í hesum døgum gongur í Sjónleikarhúsinum í Havn**

UMMÆLI

*Carl Jóhan Jensen*



**Piaf**
**Høvundur: Pam Gems**
**Týðing av leikteksti: Hans Tórgarð**
**Týðing av sangtekstum: Jytte Joensen**
**Leikstjórn: Sigrún Valbergsdóttir**
**Høvuðsleikari: Jytte Joensen**
**Tónlistarlig leiðsla: Stamen Stantchev, Agnar Lambhauge**

Hin gráa temur, ljóðar eitt føroyskt tiltak. Tiltakið sipar til ta kenslu, sum stundum kann gerast nøsk, at fyrr ella seinni fær verðin bilbugt við tær og grevur teg í øskuna av lívsvilja tínum og gleði.

Men summi temur hin gráa aldri.

Og franska sangkvinnan Edith Piaf sýnist at hava verið ein teirra, sum verðin, við øllum sínum órættvísi, aldri fær boygt. Lív hennara og sanglist eru evnið í leikinum, sum Havnar Sjónleikarfelag frumsýndi leygarkvøldið.

Leikverkið, sum er eftir bretska høvundin, Pam Gems (f. 1925), ger ein ælaboga av sangi og drama gjøgnum tað stormsama lívið hjá Piaf, frá tí hon á ungum árum livir eitt armóðsligt lív saman við vinkonu síni, eini syndadrós, og hevur útkomu sína hálvpartin av at syngja á gøtunum í París og hálvpartin av mannfólki, til hon á heysti í 1963 doyr av krabbameini, tá langt síðani vorðin sangstjørna, eitt navn fest í hvørs mans huga víða um lond. Leikurin teknar eina hálvromantiska, hálvfeministiska mannmynd av Piaf. Hon er flogvitið, í nærum nítjandualdar merking, men samstundis eisini ein tjúgundu aldar kvinna, eitt lágstættarbarn, sum hevur eitt tvívent samlag við tann mannfólkastýrda heim, hon kemur til í. Ymiskt er hon offur, ymiskt hin mótrisni einstaklingurin, ið ongan letur binda seg, ongar reglur virðir. Gaman í seta menn karmarnar um yrkissanglív hennara, hava valdið og troyta gávur hennara í sínum skammleysa pengaspæli o.s.frv. Men á palli í sanginum, í erotikkinum og í máli sínum sætar hon sær sjálvari, setur hon korini.

Leikverkið er upprunaliga skrivað fyri stórleikhús í London, ið hava lagaligar umstøður at seta upp stórverk og at fáa úrvalsfólk, bæði til leik og sang, í øll lutverk, stór sum smá.

Sýningin í Sjónleikarhúsinum er hinvegin ein áhugaleiksuppseting burturav. Og hóast tað má sigast at vera eitt hav, ið Havnar Sjónleikarfelag, her lyftir, so dylst ikki, at havið helst er í tyngra lagið.

Ikki tí at sýningin sum so er miseydnað, tað haldi eg ikki. Men hon hongur øll á einum leikara, Jytte Joensen, ið spælir Piaf. Jytte Joensen, ið sanniliga hevur leikaragávur, evnar til lítar uppgávuna at blása lív í ta ímynd av Piaf, sum leikritið skapar.

Og hon ger tað móti øllum vónum.

Í fyrsta lagi fær hon millum nakað og einki mótspæl frá samleikarum sínum, ið flestir, tó við onkrum undantøkum (eitt nú Jóanes Lambhauge), ikki megna at geva henni tað mótspæl, ið krevst, annaðhvørt tí, at teir eru púra óroyndir á palli ella heilt einfalt tí, at hugur og dugur ikki røkka saman.

Í øðrum lagi er atstøðan í Sjónleikarhúsinum ikki hin besta til at seta upp verk av hesum slag. Tað er næstan sum at halda grind til í einum baðikari. So trongt er um á pallinum. Skiftini koma tíðum so óliðiliga, at sýningin missir tað framstroymi, hon krevur at hava. Og har tey stóru sanguppleggini koma fyri, vilja hølisumstøðurnar, eitt nú ov lítil fjarstøða millum pall og áskoðara, rættiliga ampast fyri eygum og oyrum.

Alt hevur hetta við sær, at sýningin, serliga í øðrum parti (t.e. eftir steðg) fer at kennast nóg so langdrigin.

Um týðingina, sum Hans Tórgarð hevur gjørt, er stutt at siga, at hon er ikki av teimum lakastu. Kortini haldi eg, at tað er tíð upp á, at tey, sum fáast við leiktýðingar, gera sær grein fyri, at tað saktans ber til at endurskapa gerandismál (og fyri tann skyld alskyns grovt mál við) á lættskildum, trúverdugum og góðum føroyskum. Sangtekstirnir, sum Jytte Joensen sjálv hevur føroyskað, eru yvirhøvur rímiliga væl týddir, okkurt neyðrím og øvut orðalag í støðum undantikin.

Samanumtikið er Piaf, sum áhugaleikverk, á einari leið og væl vert at síggja.

Spyrst so livst.